# Áseta karmar til eftirskúlar í Føroyum

*Fara 100 næmingar í 2 eftirskúlar, og gjaldið verður ásett til 9.000 kr. fyri hvønn næming um árið, verður samlaða útreiðslan hjá føroysku kommununum 900.000 kr. um árið, verður mett í uppskotinum um eftirskúlar, sum Signar á Brúnni hevur lagt fram*

ÓLAVUR Í BEITI

Signar á Brúnni hevur lagt uppskot fram um eftirskúlar í Føroyum, og í lógini verður sagt, at endamálið við lógini er at skipa viðurskiftini, áseta karmarnar og tann almenna stuðulin til eftirskúlar í Føroyum, soleiðis at áhugað kunnu fara undir virksemið. Og lógin er galdandi fyri eftirskúlar, sum undirvísa aldursbólkum samsvarandi 8.- 10. flokki í fólkaskúlanum. Høvuðsreglan er, at næmingarnir búgva á skúlanum.

Í viðmerkingunum sigur Signar á Brúnni, at í nýggju fólkaskúlalógini, er undirvísingarskyldan longd til 9 ár, og tí eru ásetingarnar í lógini, um at næmingar í 8. – 10. fl. kunnu lúka undirvísingarskylduna á annan hátt, neyðugar. Tað ber illa til at noyða næmingar, sum av onkrari orsøk ikki trívast í fólkaskúlanum ella ikki megna at fylgja undirvísingini, at halda á, til 9 ára undirvísingarskyldan er lokin, uttan at hava serlig undirvísingartilboð at bjóða. Eftirskúli er tí ein góður valmøguleiki hjá hesum næmingum og er eisini nevndur í fólkaskúlalógini, uttan tó at nakar eftirskúli er í Føroyum.

**Sjálvognarstovnar**

Upplýst verður í viðmerkingunum, at lógin ásetir, at eftirskúlar verða stovnaðir sum sjálvsognarstovnar, har foreldrini, ein áhugabólkur, næmingar og starvsfólk manna stýrið. Stýrið er ovasti myndugleiki. Tað setir og loysir starvsfólk úr starvi. Rætturin hjá næmingum og starvsfólki verður tryggjaður á fleiri økjum, og mark verður sett fyri, hvussu lágt næmingatalið kann vera fyri at fara undir virksemið.

Og viðvíkjandi rakstrinum, sigur Signar á brúnni, at hann verður tryggjaður við stuðli frá landsstýri og kommunum eftir føstum reglum. Hesar reglur áseta stuðulin frá landsstýrinum til 70% av øllum rakstrarútreiðslum til skúla og skúlaheim. Samstundis verða latin 50% av byggiútreiðslum í rentu- og avdráttarfríum lánum. Til undirvísingaramboð verða latin 50% av kostnaðinum. Stuðulin frá landsstýrinum samsvarar við stuðulin til fólkaháskúlar.

– Kommunurnar lata 70% í stuðli til hvønn næming av tí upphædd, sum ein miðalnæmingur kostar kommununi í teirra egna fólkaskúla, sigur Signar á Brúnni..

**Fíggjarligar avleiðingar**

Verður lógin samtykt, skulu kommunurnar gjalda 70 % av rakstrarútreiðslunum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum, og tað kundi tí hugsast, at talan var um eina sparing fyri kommununa, tá ið næmingar fara í eftirskúla í staðin fyri í kommunala skúlan, metir undirvísingarmálaráðharrin.

– Fara 100 næmingar í 2 eftirskúlar, og gjaldið verður ásett til 9.000 kr. fyri hvønn næming um árið, verður samlaða útreiðslan hjá føroysku kommununum 900.000 kr. um árið. Og landsstýrið ber eftir uppskotinum 70% av kostnaðinum av rakstrarútreiðslunum.

**Menningartarnað**

Eftir uppskotinum verður eisini møguligt hjá menningartarnaðum at fara á eftirskúla, og sambært eini kostnaðarætlan fyri eftirskúla, ið hevur kostdeild, eru mettu rakstrarútreiðslurnar uml. 5 mió. kr. Hetta er fyri ein skúla við 20



næmingum. Í hesum tølum eru leiguútreiðslurnar 120.000 kr., sum er ógvuliga lágt sett, sambært undirvísingarmálaráðharranum, men her eru ongar byggiútreiðslur.

Landsstýrisins partur hevði verið 70 % av rakstrarútreiðslunum, ella uml. 3,5 mió. kr.

PÁSKATILBOÐ
& 14. - 24. apríl
21. apríl - 1. mai


Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
2 vaksin 2 børn í bili
úr 3.995,-

Dansk Folke-ferie
Vigsø
úr 5.195,-
Á hotelli í 1 viku:
Hotel Hanstholm úr 2.995,-
Fyri hvønn við 2 fólkum í bilinum
Park Hotel Aalborg úr 2.995,-
Hotel Excelsior Keypmannahavn úr 3.595,-
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
www.smyril-line.fo e-mail: booking@smyril-line.fo

## Viðmerkingar:

## Søgdu løgmaður og varaløgmaður ósatt?

Í krosskasti segði løgmaður fyri opnum skermi: Vit fara ikki at loysa.

2 dagar seinni møtir hann donsku stjórnini við einum uppkasti har stendur: Denne traktat om associeret statsforbindelse_ OPRETTER FÆRØERNE SOM EN FRI OG SUVERÆN STAT (afsnit 1,artikel 1, stk 2).

Nevnda orðing er loysing - tað kann ikki sigast greiðari!

Er Afsnit 1, artikel 1 stk 2 gjørt eftir krosskast sendingina? Tað eru vit mong, ið ivast í. Um ikki, var farið lætt um sannleikan av løgmanni í krosskasti, frammanfyri øllum føroya fólki.

Tað sæst svart uppá hvítt, nú samráðingarnar tíbetur ikki eru duldar meira.



**Nyrup framdi neyðugan opinleika í samráðingunum**:

Boðskapurin hjá Nyrup er krystalklárur- 3-4 ár um loysing verður vald. Tað kunnu føroyingar fyrihalda seg til.

Mátin boðskapurin var framborin av Nyrup, kundi verið meira heppin. Nú roynir samgongan at fara eftir Nyrup, heldur enn fyrihalda seg til boðskapin hann kom við. Somuleiðis royna teir at skapa eina nationalromantiska øsing ímillum føroyingar. Tað er tað vit hava minst tørv á nú. Føroyingar hava tørv á at vita konsekvensin av tí samgongan hevur runnið undan alla tíðina: Hvørjir vansarnir eru av at loysa.

Gleðiligt er, at almenningurin í Føroyum nú kann fylgja við í samráðingunum. Vónandi fara okkara menn at halda seg til sannleikan. Og kalla ein spaka fyri ein spaka. Tí tað er fyritreytin fyri øllum konstruktivum arbeiði.

**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

## Viljin til gott verk



Viljin til gott verk er grundarlagið undir einhvørjum samstarvi við meining.

Viljin hjá øllum pørtum við makt at avgeva part av síni makt í tænastuni hjá framburðinum er treytin fyri einhvørjum málsetningi, sum skal hava bert ein lítlan møguleika fyri at eydnast.

Evnini hjá tí einstaka við makt - t. e. við heimildum yvir øðrum menniskjum og felags tilfeingi – at skapa felags stev hjá teimum, sum vilja tað góða, er kjarnin ´'i góðum leiðslueginleikum.

Soleiðis verður tað viljin og evnini hjá teimum, sum á avgerandi hátt ávirka gerandisdagin hjá øðrum menniskjum, sum avger, um tað ber til at fremja gott verk. Hetta er persónligt.

Situr onkur á ovastu rók, sum annaðhvørt ikki hevur viljan ella ikki hevur evnini til gott verk, so er støðan vónleys - teoretiskt og praktiskt. Har lekur ikki dropin millum teori og praksis.

Tí er tað eisini av avgerandi týdningi at hava ein mátistokk fyri hendan viljan og hesi evnini. Í tí privata er botnlinjan ein máti stokkur, sum ofta verður brúktur í hesum sambandi. Í tí almenna er tað væl truplari.

Men her finst ein mátistokkur fyri viljan til gott verk, sum er rættiliga vísur – kanska serliga brúkiligur í almennum høpi, har kapping millum virki ikki er ein forðing. Tann, sum vil gott verk, vil eisini vera opin. Tann, sum ikki vil gott verk, hevur ongan møguleika at vera opin.

Hesin mátistokkurin hevur tann góða eginleikan, at vit kunnu venda honum við. Hevur ein persónur ikki viljan til at vera opin, so er heldur eingin vilji til gott verk. Fyri slík fólk hevur orðið »samstarv« ein heilt annan týdn8ing enn tað hevur fyri tey, sum vilja gott verk.

At sita á lønarlista hjá tí, sum ikki vil gott verk, er ikki stuttligt. At hava ein, sum ikki vil gott verk, á sínum lønarlista er heldur ikki stuttligt. So óstuttligt, at leiðslulæran beinleiðis frámælir báðum.

Signar P. Heinesen



# Matstovur og hotell í Føroyum á svartalista

*Hotell Vágar er einasta hotellið og matstovan í Føroyum, sum heldur sáttmálan, og tað fær nú avleiðingar fyri hini hotellini og hinar matstovurnar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú fer Føroya Arbeiðarafelag at seta tiltøk í verk ímóti fleiri føroyskum hotellum og gistingarhús, umframt fleiri føroyskum matstovum.

Tað verður gjørt, tí tey vilja ikki halda sáttmálan, sum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag undirskrivaðu í fjør fyri hotell-, gistingarhús- og matstovuyrkið.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at Hotell Vágar er tað einasta hotellið og matsotvan, sum heldur sáttmálan.

Hon sigur, at t.d. er púra onki hent í Havnini, har nógv tey flestu gistingarhúsini og tær flestu matstovurnar eru.

– Alt hetta merkir, at skulu tey, sum arbeiða á matstovum, hotellum og á gistingarhúsum kunna skipa seg, og virka eftir sáttmálanum, má harðligari takast til enn higartil, sigur hon.

Hon sigur, at tað verður heilt einfalt gjørt við at seta øll gistingarhús og allar matstovurnar, uttan Hotell Vágar, á svartalista.



*Tað fær nú avleiðingar fyri tey gistingarhús og tær matstovur, sum ikki vilja hava, at starvsfólkið er limur í fakfelag, sigur Ingeborg Vinther. Øll hotellini og allar matstovur, uttan Hotell Vágar verða nu sett á svartalista og tað langt út um landoddarnar eisini, segði Ingeborg Vinther á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í gjár*

**Ræðast at skipa seg**

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tey, sum arbeiða í hesi vinnuni, ræðast fyri at skipa seg í felag og tí verður neyðugt at seta tey hotell, gistingarhús og matstovur á svartalista, sum ikki vilja hava fólk, sum eru limir í fakfelag í starvi, ella sum ikki halda sáttmálan.

Og tað er eisini longu nú greitt, at tiltøkini, sum Føroya Arbeiðarafelag fer at seta í verk ímóti gistingarhúsunum og matstovunum, fer heilt skjótt at merkjast.

Føroya Arbeiðarafelag hevur samstarv við Nordisk Union og síðst í mai mánaði kemur Nordisk Union til Føroya at hava stýrisfund.

Hesin fundur verður hildin á Hotell Vágum. Og í hesum føri var tað ikki trupult avgerð at velja fundarstaðin.

– Tað ber snøgt sagt ikki til at halda fundin á einum hotelli, har leiðslan ikki vil, at starvsfólkini skulu vera limir í fakfelag, og sum heldur ikki vilja halda seg til sáttmálan, sigur Ingeborg Vinther.

Men støðan kann saktans blíva truplari enn so. Tí formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag leggur dent á, at koma hesi viðurskiftini ikki í rættlag, fara umboðini fyri feløgini úr Nordis Union at boða norðurlendsku fakfelagsrørslunum frá, at tær skulu ikki halda fundir og ráðstevnur á teimum hotellum og gistingarhúsum í Føroyum, ið ikki hava hava fingið síni fakfelagsviðurskifti í rættlag.

– Av tí at vit hava samstarv bæði á norðurlendskum og altjóða stigi, er onki til hindurs fyri at boða øðrum londum frá støðuni her heima, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at Føroya Arbeiðarafelag fer at gera, hvat tað kann fyri at fáa hendan sáttmálan at virka skjótast gjørligt. Og hon sigur, at eitt boykott í altjóða fakfelagsrørsluni er eitt munandi stig á leiðini

# Dagrøktarmammur skipa seg í fakfelag

*Alsamt fleiri dagrøktarmammur melda seg inn í lokalu arbeiðarafeløgini, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag*

ÁKI BERTHOLDSEN

Dagrøktin er eitt øki, sum ikki hevur verið væl fyri, hvat fakfeløgum viðvíkur.

Tær flestu dagrøktarmammurnar hava ikki verið í nøkrum fakfelag.

Men nú er ætlanin at gera álvara av at fáa fær skipaðar í fakfelag.

Ongar dagrøktarmammur, uttan tær í Havnina og í Klaksvík hava havt sáttmála við kommunurnar og hava heldur ikki verið í fakfelag.

– Men fyri góðum ári síðan fóru tær í Kollafirði og Leirvík upp í tey lokalu limafeløgini hjá FA, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin í gjár.

Og hon leggur afturat, at seinni hava eisini tær í Vági, á Toftum, á Skála og fleiri aðrastaðni við, meldað seg inn í tey lokalu arbeiðarafeløgini, sum aftur eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Eftir fund í Føroya Arbeiðarafelag hava vit sett 1. apríl sum seinastu freist hjá dagrøktarmammunum at melda seg inn í tað lokala arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther sigur, at ætlanin er síðani at hava samráðingar við kommunurnar um sáttmála fyri dagrøktarmammurnar.

Næst hesar samráðingar verða, veit hon ikki.

Fyrsta stigið er at fáa tær skipaðar í fakfelag. so fara vit undir samráðingar seinni

– Vit kunnu bert fegnast um vit fáa tær sum limir í Føroya Arbeiðarafelag, tí er tað nakað, sum ger eitt fakfelag sterkt, so er tað samanhald, og vit hava sanniliga brúk fyri at fylkjast í stríði.

GSM frá Føroya Tele

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!
Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...
Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.
Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.
Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.
Vanligt hald
Til teirra, sum sjálvi ynskja at seta haldið saman við teimum tænastum, sum eru til taks, og har nýtslan er javnt býtt millum dag og kvøld. Við vanligum haldi kanst tú m.a. senda SMS-tekstboð.

| Kostnaður fyri vanligt hald | |
|---|---|
| Stovning | 500,00 kr. |
| Mánaðargjald | 115,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 2,40 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,40 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo